UTTAN ÚR HEIMI

# FBI ávaraði um álop við ferðamannaflogførum

**Á sumri í 2001 ávaraði ein embætismaður hjá FBI fleiri ferðir amerikonsku myndugleikarnar um, at yvirgangsmenn ætlaðu at ræna flogfør til atsóknir í USA. Men myndugleikarnir vildu ikki lurta**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Zacarias Moussaoui*

*Mynd: Reuters*

Hetta kom fram undir rættarmálinum ímóti Zacarias Moussaoui, sum er ákærdur fyri at hava verið við til at leggja atsóknirnar at New York og Washington tann 11. september í 2001 til rættis. Sambært amerikanska ákæruvaldinum vóru yvirgangsmenninir upprunaliga 20 í tali, men Moussasoui bleiv tikin, og tí vóru tað hinir 19, sum fullførdu atsóknirnar.

Tað var FBI-agenturin Harry Samit, sum tók Moussasoui í august í 2001, og undir avhoyringunum fekk hann illgruna um, at okkurt var í umbúna. Meiri enn 70 ferðir vendi hann sær til sín deildarleiðara á høvuðsskrivstovuni hjá FBI í Washington og greiddi honum frá, at hann hevði illgruna um, at Moussasoui var limur í al-Qaeda, og at hann ætlaði at ræna eitt flogfar. Harafturat bað agenturin fleiri ferðir um heimild til at kanna ymsar ognarlutir hjá tí handtikna so sum eina teldu, men svarið úr Washington var nei.

Tá Zacarias Moussasoui varð tikin, var hann í ferð við nakrar venjingar í einum sokallaðum flogsimulatori, har útgerðin var tann sama sum í einum Jumbojet-flogfari. Tað unmdraði Harry Samit, tí Moussasoui var ikki flogskipari og hevði heldur ongar royndir sum slíkur.

Undir avhoyringunum seinni viðgekk tann Moussasoui, at hann var limur í al-Qaeda, og hann er tann einasti, sum er komin fyri rættin í USA fyri at hava verið uppi í atsóknunum 11. september í 2001. Rætturin skal nú taka støðu til, um hann skal dømast lívlangt fongsul, ella um hann skal fáa deyðarevsing.

Ákæruvaldið hevði biðið Harry Samit vitna í rætttinum, tí ákæruvaldið helt, at hansara frágreiðing kundi vátta, at myndugleikarnir kundu havt forða atsóknunum, hevði Moussasoui sagt sannleikan, tá hann bleiv tikin. Men nú er líkt til, at frágreiðingin tvørturímóti kann koma tí ákærda til góðar, tí sambært Samit vildi FBI ikki lurta eftir hansara ávaringum.

*(Kelda: Aftenposten)*

# Maturin gongur undan í Gaza

**Strangt ísraelskt eftirlit við markinum ger, at maturin er farin at ganga undan í Gaza-geiranum**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Meðan fólk í Ísrael tosa um valið, sum verður um eina viku, stúra tey í Gazageiranum fyri, hvat kann henda, tí har er maturin farin at ganga undan. Goymslurnar hjá ST eru longu tómar, og tað stendur á hjá fólki at fáa breyð.

Tað mesta av vørunum til Gaza-geiran kemur sjóvegis, men tann flutningurin steðgaði, tá ísraelsmenn stongdu farleiðina herfyri. Eftir trýsti úr USA loyvdu ísraelsmenn sjey lastbilum við matvørum inn í Gaza-geiran í gjár, men sambært palestinsku myndugleikunum stongdu ísraelsmenn farleiðina aftur beinanvegin. Ísraelska grundgevingin fyri at steingja farleiðina er, at víðgongdir palestinar hava søkt at økinum fleiri ferðir.

Ísrael tók seg aftur úr Gaza-geiranum í fjør, og síðani hava ísraelsku myndugleikarnir frásagt sær ábyrgdina av matvøruflutninginum til geiran. Men palestinar vísa á, at ísraelska eftirlitið við markinum er so strangt, at í veruleikanum er tað framvegis Ísrael, sum hevur alt eftirlit við geiranum.

Teir palestinsku sjálvstýrismyndugleikarnir finnast eisini at ísraelsku stjórnini. Teir vísa á, at Ísrael hevur eftirlit við marknaliðunum, luftini, sjónum og fólkayvirlitinum í Gaza-geiranum, og tí kann landið ikki frásiga sær ábyrgdina av viðurskiftunum í økinum.


# Ítróttarsosialurin
## – vit eru har tað hendir




## Deyð í kulda

Tað hevur verið rættiliga kalt í Japan í seinastuni, og tað hevur kostað fleiri fjallaklatrarum lívið.

Týsmorguninkomubjargingarlið framá tvær kvinnur, sum høvdu roynt at sleppa niðan á fjallið Sennokura í Nigata-landspartinum. Kvinnurnar, sum vóru 54 og 62 ára gamlar, vóru deyðar í kulda. Sjey onnur fólk vórðu flutt á sjúkrahús, og ein 54 ára gamal maður, sum var saman við teimum, er ikki komin afturíaftur. Í gjár leitaðu tyrlur hjá bjargingartænastuni eftir honum.

Í landspartinum Nagano funnu bjargingarlið tveir menn og eina kvinnu, sum vóru deyð í kulda, eftir at tey høvdu roynt at sleppa niðan á tað 2.805 metrar høga fjallið Amidadake. Menninir vóru 47 og 57 ára gamlir, og kvinnan var 45.

## Treholt mist vitið

Norðmaðurin Arne Treholt, sum bleiv dømdur fyri at hava njósnast fyri gamla Sovjetsamveldið, hevur ligið við ongum viti teir seinastu dagarnar.

Tey seinastu árini hevur Arne Treholt búð á Kýpros, og í síðstu viku varð hann í skundi fluttur á eitt sjúkrahús har. Verji hansara, Harald Stabell, visti av ongum, tá hann kom til Kýpros mánadagin, men hann sigur seg hava skilt, at Treholt hevur fingið blóðeitran, men at læknarnir duga ikki at finna orsøkina. Tá verjin kom, umhugsaðu læknarnir at sløkkja andingartólið, sum Treholt liggur við, men tað bleiv kortini ikki gjørt, skrivar ANB.

Ørindini hjá verjanum vóru annars at tosa við Arna Treholt, tí teir ætlaðu sær at biðja norska dómsvaldið viðgera njósningarmnálið upp av nýggjum. Men fyribils verður einki gjørt við tað.

## Dýrur veggur

Ein kvinna í New Orleans, sum var í ferð við at rudda í húsaleivdunum eftir ódnina "Katrina", fann nú um dagarnar ein plastikkposa við næstan 30.000 dollarum.

Kvinnan fann posan í einum veggi í einum húsum, sum rapaðu í ódnarveðrinum. Hon sigur við fjølmiðlarnar, at hon var í ferð við at raka ymiskt órudd saman við einari rívu, tá hon fekk eyga á posan. Tá hon tók hann upp, vísti tað seg, at hann var fullur av 100-dollaraseðlum.

Kvinnan fór alt fyri eitt til løgregluna við posanum, og á støðini komu tey eftir, at har vóru næstan 30.000 dollarar. Tað vísti seg, at ein kvinna hevði átt tey niðurrapaðu húsini, og hon hevur nú fingið pengarnar aftur, skrivar AP úr New Orleans.

## Illir munkar

Tað er ikki á hvørjum degi, at munkar ganga mótmælisgongu og rópa ókvæmisorð, men tað hendi í srilankiska høvuðsstaðnum Colombo í gjár.

Meiri enn hundrað buddhistiskir munkar gingu mótmælisgongu til norsku sendistovuna í býnum, har teir róptu ókvæmisorð eftir norska sendiharranum, Hans Brattskar, og diplomatinum Erik Solheim. Munkarnir sluppu tó ikki at sendistovuni, tí løgreglan hevði sett byrgingar upp uttanfyri.

Tað var serliga Erik Solheim, sum stóð fyri skotum. Hann stendur á odda fyri royndunum at finna semju ímillum stjórnina í Colombo og teir tamilsku uppreistrarmenninar har norðuri í landinum, men munkarnir vilja vera við, at norsku friðarroyndirnar fara at enda við, at Sri Lanka verður býtt sundur í tvey ríki.

– Tann buddhistiska prestastættin hevur ikki álit á einum semingsmanni, sum bara hjálpir øðrum partinum, og tí vilja vit hava norðmenninar av landinum, segði talsmaðurin hjá munkunum.

Noreg hevur vegna ST havt ábyrgdina av friðarroyndunum í Sri Lanka síðani í 2000, og sambært Aftenposten er hetta ikki fyrstu ferð, at teir norsku semingsmenninir eru lagdir undir at styðja tamilarnar.